Broyting í ásetingunum samtykt av Tvøroyrar Býráði 26. februar 2026:

**§ 33: Øki G: Neystaøki**

1. Økið verður lagt av til neystabygging og bátapláss.
2. Neyst skulu í høvuðsheitum nýtast til bátahald, men neystaloft kunnu innrættast til annað hóskandi endamál, eftir góðkenning frá byggimyndugleikanum.
3. Neystini skulu standa lið um lið við skjøldri móti sjónum, og skjøldrar skulu vera millum 3 og 5 m breiðir. Neyðugar gøtur kunnu tó vera ímillum.
4. Neystini skulu hava mønu og takhall millum 35 og 50 stig, tó vegleiðandi triðingsreising (u.l. 42 stig). Neyst mugu ikki verða bygd í fleiri enn 2 hæddum (íroknað loftshædd) og ikki vera hægri enn 6,5 m til mønuna, mátað frá kotu 2,00.
5. Neyst, sum hava innleggingar, skulu íbindast skipaða kloakk og vatnveiting fyri eigarans rokning.
6. Innrætting av neystaloftum kemur undir somu brunatrygdarligu áseting ímóti grannum, sum samanbygd sethús. Ímóti neystinum undir loftinum eru brunatrygdarligu ásetingarnar tær somu sum fyri bilhús í sethúsum.
7. Býráðið skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum, í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.
8. Býráðið kann velja at víkja frá hædd, halli og sniði, um serlig viðurskifti, ella grannabygging, tala fyri tí – ella um serlig byggiætlan verður gjørd fyri samanhangandi part av neystaøkinum.